

## Ólafur Ragnar til India

Um ein góðan mánað fer íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, til India at taka ímóti Nehru-heiðurslønini, sum varð tillutað honum í fjør. Össur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri, fer við forsetanum, og íslendsku fjølmiðlarnir leggja dent á, at indisku myndugleikarnir rinda ferðirnar hjá teimum báðum. Nehru-heiðurslønin er tann tignarmesta heiðurslønin, sum verður latin í India. Onnur, sum hava fingið hana, eru eitt nú Nelson Mandela, Martin Luther King, Olof Palme, Helmuth Kohl og Móðir Teresa.

# Virðismikil Nólsoyarsøga

Bøkur



*Bókaverkið » Nólsoy – Søgubrot og Fólk« eftir Egon Hansen er kanska tann mest umfatandi bygdasøgan, sum er komin út á føroyskum*

*Bókaverkið » Nólsoy – Søgubrot og Fólk« eftir Egon Hansen er kanska tann mest umfatandi bygdasøgan, sum er komin út á føroyskum*

**Bókaverkið *Nólsoy – Søgubrot og Fólk* er ein virðismikil lýsing av teimum treytum, nólsoyingar hava livað undir í forum og til dagin í dag. Nakað vit nú kunnu varðveita til gleði fyri komandi ættarlið**

UMMÆLI

*Jákup av Skarði*

Fyri stuttum er komin út í tveimum bindum bygdasøga, *Nólsoy – Søgubrot og Fólk*, ið Egon Hansen hevur savnað og skrivað. Tað er at frøast yvir, at vit hava kvinnur og menn her á landi, sum eru hugað fyri at varðveita bygdasøgur okkara, so hon ikki fer fyri bakka. Bygda- og ættarsøgan er ein mentanararvur, ið tjóðin ikki kann vera fyri uttan. *Nólsoy – Søgubrot og Fólk* er ein gjøllig lýsing av teimum treytum, nólsoyingar hava livað undir í forum og til dagin í dag. Nakað vit nú kunnu varðveita til gleði fyri komandi ættarlið.

Við bókaverkinum, *Nólsoy – Søgubrot og Fólk,* hevur Nólsoy fingið eina nágreiniliga bygdasøgu, ið gevur lesaranum innlit í allar tættir í bygdarlívinum frá sjóvarstrond til fjallatind. Hvat kvinnur og menn hava tikist við í dagliga yrkinum, bæði á sjógvi og landi, í bø og haga.

Í fyrru hálvu av 19. øld lá framtakshugurin frammarlaga í huganum á nólsoyingum. At fáa føroyingar at geva sigling og fiskiskapi ans við deksførum. Teir gingu á odda her á landi og løgdu sjálvir rygg til at byggja fiskifør í Nólsoy, og síðani út á hav at veiða. Eisini bátasmíð hevur eyðkent nólsoyingar í fleiri ættarlið.

Mentanarlívið hevur eisini fingið sína rúmd í bókunum. Bæði í álvara og gaman. Ein natúrligur partur í gerandislívnum, har fólkið dró eina línu, tá ið tað galt um felagsskap. Vit verða kunnað um kirkju og skúla. Ja, eisini tá nólsoyingar fóru niður til kong at mótmæla tvungnari skúlaskyldu í Føroyum. Hetta kann í dag tykjast løgið og afturhaldandi, men mentanarliga hevði Danmarkarferðin kortini stóran týdning. Nólsoyingar lærdu og fingu ans fyri nýggjum sálma-, sangløgum og tónleiki, tá teir av Flatlondum høvdu við sær aftur eina harmoniku. Kvøðing, sangur og tónleikur hevur sett dám á felagslívið í bygdini líka til dagin í dag.

Fyrra bókin lýsir gjølla tíðina – hundrað ára skeiðið – tá ið fólk vóru knýtt at vitanum á Borðuni. Vit fáa at vita hvør starvaðist har, og hvørji húski vóru knýtt at vitanum til tøknin tók yvir. Í dag býr eingin á Borðuni. Men eftir stendur vitin og húsini sum ein prýðiligur varði um framrakandi byggilist, har eisini føroyskar hendur vóru við í arbeiðinum. Hugstoytt er at síggja, at hesin dýrgripur stendur sum ónýti, heldur enn av verða umskapaður til listafólk og aðrar týdningarmiklar vitjanir.

Seinna bindið er í stóran mun ættarsøga nólsoyinga, og hvar nólsoyingar eru spjaddir út um alt landið við teirra eftirkomarum í triðja ættarlið. Í bókini verður greitt frá húsunum í bygdini, og hvørji fólk eru ættað úr teimum. Eisini ymiskar frásagnir, ið eru knýttar at einstaklingum verða nevndar.

Tað er áhugavert at síggja, hvussu fólkið við giftu fer út um alt landið. Vit fylgja t.d. nólsoyingunum, sum grundaðu Tvøroyri, tá Kongaligi Handilin stovnaði úthandil í Suðri. Siggu í Búð sum er ættarmamma til Effersøe og Müller- fókið í Føroyum. Systrarnar Marin Elisabeth sum giftust inni á Fjørð í Vestmanna og Inga til Miðvágs, hvørs eftirkomarar eru nógvir í Vestmanna og Ellefsenfólkið í Miðvági. Av øðrum nólsoyingum í Miðvági kann nevnast Lonafókið.

Somuleiðis eru nógv ættarbond báðar vegir millum Nólsoy og Toftir. Nólsoyargenta Elsebeth Malena úr Lon giftist við Regnábóndanum. Tey eru foreldur til fyrsta dreingjabarnið við eftirnavninum Højgaard í Føroyum. Eisini uppi á Regni, á Hamri og í Leigustovuni á Toftum vóru matmøðurnar úr Nólsoy.

Av øðrum nólsoyingum sum eru kendir um Føroya land eru systkini Pól Niklái Danielsen skipari í Heiðunum og systrar hansara, Katrina Sofia sum giftist til Klaksvíkar og Maria til Hvannasundar. Maria er mamma navnframu trolaraskipararnar, nevndir Hvannasundsbrøðurnir.

Sára Malena, ættað av Geil, ið giftist við Johan Hendrik Weihe í Søðarfirði, er langomma Victor Danielsen, meðan Marin Kristina Holm, eisini av Geil, sum giftist til Mykinesar, er omma Kaj Leo Johannesen løgmann. Soleiðis kundi ein hildið fram. Okkurt er tó hjá lesaranum sjálvum at finna útav.

Tað er ov rúgvusmikið at nevna alt innihaldið í bókunum, sum innihaldsyvirlitið nágreiniliga vísir. Bøkurnar eru yvir 600 blaðsíður stórar við 250 myndum. Nevnd eru um 6000 fókanøvn, ið eru at finna í navnalistanum. Hetta ger, at bøkurnar kunnu nýtast sum uppslagsbøkur.

*Nólsoy – Søgubrot og Fólk* lýsa bygdasøguna á ein upplýsandi og hugvekjandi hátt. Eru væl skrivaðar við løttum máli. Prentlistarliga eru tær væl úr hondum greiddar. Tær eru vakrar við dyggum innihaldi. Kanska tann mest umfatandi bygdasøgan, sum er komin út á føroyskum.